# við djórini

uttan at fáa nakað endurgjald.

Tað er annars gjørdur ein filmur um Kitlope, har James Robertson medvirkar, og har hann fegnast um at hansara "barndómsdalur" verður varðveittur fyri eftirtíðina.

## Mentan og laksur

Tað, sum James hevði bestan hug at greiða frá, var um sína upprunamentan heima í Kitlope. Tað er óneyðugt at siga, at tað ikki er á hvørjum degi, at slíkt er føroyingi ella føroyskum blaði beskorið, so vit vildu fegin frætta so nógv, sum tíðin loyvdi tí. Og tað sum vit ikki náddu á staðnum útvegaði Anfinn Mikkelsen seinni.

Hann kennir serliga væl James, og hesin kennskapur kemur nú okkara lesarum til góðar.

Laksur hevði ein sera stóran týdning fyri fólkið á leiðini. Fyri indianarar var hann, umframt føði, ein týðandi partur av teirra mentan. James greiddi fyrst frá um "the first salmon", t.v.s. fyrsta laksin í árinum, sum kemur niðan í áirnar. Laksurin er ein sera týdningarmikil føðikelda hjá indianarum, kanska nakað sum grindin hjá okkum. Tí var tað ein serlig hátíð, tá ið laksurin kom á fyrsta sinni á árinum. Tí skuldi laksurin eisini móttakast við teirri tign, hann hevði uppiborið.

Millum annað skuldu tey ungu við "first salmon" nýta høvi at læra at hagreiða laksin, og hetta hevði jú avgerandi týdning fyri tey ungu at duga sum frá leið.

Tað fyrsta, sum varð gjørt í samband við komuna av laksinum, var at takka tann himmalska skaparan fyri, at laksurin var afturkomin. Høvdingurin bað síðan eina bøn í hvørja ætt: Til himmalska faðirin í eystri, til sonin í suðuri, til heilaga andan í vestri og til umhvørvið, ella Móður Náttúru, í norðri.

Táið hetta var gjørt, varð vatnið við áin roknað at vera reinsað, og laksurin kundi ótarnaður fara tann seinasta teinin, tveir fjórðingar, niðan í Kitlopevatnið at gýta.

Hetta var eisini nakað sum lønti seg aftur. James segði frá abba sínum Gordon, at laksurin takkaði abba hansara fyri, at ferðin hjá honum harvið gjørdist lættari. Sum kunnugt doyr laksurin eftir, at hann hevur gýtt. Men frásøgnin er, at laksurin fyri hjálpina lovaði at "tit skulu fáa okkara kroppar afturfyri". Teir kundu so koma fólkinum til nyttu.

## Strong revsing fyri bannaða veiðu

Skipað varð eisini fyri vælkomstdansi fyri laksinum, har Gud eisini varð prísaður fyri gávuna.

Næsta morgun hittist fólkið aftur. Og vatnið, haðani laksurin kom, varð ímyndarliga býtt í fýra partar, ein fyri hvønn av klanunum sum eru: 1. bevari, 2. ørn 3. mastrarhvalur og 4. ravnur.

Hetta varð hátíðarliga gjørt av høvdinginum. Hann skar hjartað úr tí fyrsta laksinum í fýra partar, eitt fyri hvønn klanin. Síðan rópti hann navnið á hvørjum klani upp, samstundis sum hann kastaði eitt petti av hjartanum í tann partin av vatninum, har hvør klanur fekk loyvi til at fiska, tá ið laksurin var liðugur at gýta.

Um nakar fór at fiska, áðrenn laksurin er liðugur at gýta, varð hann og familjan rikin út í skógin, og har máttu tey bjarga sær sjálvum í eitt heilt ár, áðrenn tey aftur sluppu at liva í Kitlope.

Sum skilst, hava tey verið nógv frammanfyri tey flestu í stovnsrøkt! Revsingin skuldi nokk fáa ein og hvønn at halda sær í skinninum.

## Fiskurin oolichan kann nýtast til alt

Eins og laksur hevur stóran týdning, er tað sama galdandi fyri fiskaslagið, sum eitur oolichan. Hetta er ein smáfiskur, sum hevur serligan týdning fyri indianararnar. Hann kemur niðan í áirnar í mars mánaði. Hann er nakað sum smásild til støddar. Hesin fiskur er sera feitur, hevur onga roðslu og er lættur at veiða við glúpi ella enntá við berum hondum. Fiskurin kemur uttan ávaring, og fitin er bestur teir fyrstu 5-dagarnar, og tí verður hugt væl eftir nær hann kemur. Tá oolichan fyrst er komin í eina á, vita tey, at eina viku eftir kemur hann í eina aðra á, og síðan aftur eina viku seinni í triðju ánna. Tað ræður um hjá hvørji familju at bjarga sær og sínum nóg mikið eftir 2-3 døgum eftir at fiskurin er komin í ánna.

Fiskurin verður dampkókaður í stórum trogum, til feittið flotnar omaná. Síðan verður fiskurin settur at ræstna í 5-7 dagar. Tá verður feittið tikið omanav og verður fylt í smærri træíløt, og tað kann goymast fyri allan veturin. Avlopið frá framleiðsluni verður nýtt sum tøð til eplaveltur, og sagt verður, at júst hesi epli smakka serliga væl.

Hesin matur er sera virðismikil fyri indianararnar, nakað sum grind og spik fyri føroyingar – fyrr!. Oolichan feittið verður vanliga etið sum viðskeri til annan mat. Fiskurin kann eisini roykjast og turkast. Sagt verður, at oolichan feittið er ógvuliga góður heilivágur, serliga móti krími. Tí er tað eisini eftirspurt av øðrum.

Men oolichan kann eisini nýtast til onnur endamál enn til matna. Turkaður kann hesin fiskur nýtast sum kertuljós. Hann skal bert setast upp eftir enda. Tá fest verður í stertin, brennir. Hetta ljós varð eisini nýtt at lýsa heima.

Turkaður oolichan kann eisini

*Framhald á næstu síðu*



*Kitamaat sæð frá sjónum*



*Tað er stórsligið í Kitlope*



*Ættarbúnin*